## Venjari fornermaði kongin

Rumenski venjarin Cosmin Olaroiu er landsforvístur í Saudi Arabia, eftir at felagið hjá honum vann eina steypakapping har. Hann var so illur um, at hansara spælarar ikki sluppu at feiðra sigurin á sigurspallinum, at hann í øði tveitti eina troyggju við mynd av krúnprinsinum frá sær. Nú sleppur Olaroiu ongantíð aftur at virka sum venjari í landinum.



## Bolton leingir við Megson

Bolton hevur longt sáttmálan við venjaran Gary Megson. Einki verður sagt um, hvussu long nýggja avtalan er, men ætlanin er at skapa meira støðug viðurskifti í felagnum. - Vit hava eitt gott samstarv við venjaran, og eg kenni, dygdina í arbeiðnum hjá honum. Tí hava vit ikki brúk fyri nøkrum øðrum venjara í felagnum, sigur Phil Gartside, nevndarformaður.

# United vann League Cup

**Tottenham og Manchester United borðreiddu við einari spennandi finalu, sum mátti út í umdyst og brotssparkskapping, áðrenn vinnarin var funnin.**

LEAGUE CUP

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Manchester United hevur vunnið ensku League Cup-kappingina fyri triðju ferð í søgu felagsins. Leikliga var talan um eina góða finalu millum Tottenham og Manchester United. Málleyst var aftaná spæl í 120 minuttir.

Bæði í vanligu og longdu leiktíðini vóru málmøguleikar til bæði liðini, men hvørki liðið hevði neyðugu eydnuna til at koppa dystin til sín fyrimun. Aaron Lennon og Darren Bent hjá Tottenham høvdu stórar málmøguleikar, sum ungi frálíki United-málverjin, Ben Foster, bjargaði.

Alex Ferguson valdi at løna teimum ungu spælarunum, sum hava spælt liðið í Liga Cup-finaluna, og sigast má, at ungu spælarnir gagnnýttu møguleikan. United hevði eisini væl av møguleikum, tann størsti málmøguleikin hjá teimum reyðu fall tá Christiano Ronaldo rakti stongina. Klokkan vísti 91 minuttir tá.



*Frøin var stór á United-spælarunum, tá tað gjørdist teimum greitt, at teir eftir seinasta brotssparkið í League Cup-finaluni stóðu sum vinnarar av fyrsta steypinum hetta kappingarárið*
*Mynd: Jed Leicester/AP*

### Hilnaðist illa hjá Tottenham

Bert málini mangladu í tí spennandi og væl spældu finaluni, og tí var neyðugt at avgera alt við einari brotssparkskapping, og her hilnaðist stak illa hjá Tottenham.

Ryan Giggs, Nani, Christiano Ronaldo og Anderson gjørdu reint borð. Ben Foster er bjargaði skotinum hjá Jamie O´Hara, og David Bentley skjeyt við síðuna av málinum. Tað var bert kroatiski spælarin, Modric, sum skoraði fyri Tottenham, og Manchester United vann sostatt 4-1.

Manchester United hevur nú vunnið HM fyri felagslið og League Cup-kappingina, og hava teir enn møguleikan at vinna Premier League, FA Cup og Champions League í hesum kappingarárinum.

# Liverpool snávaði í Middlesbrough

**Chelsea eru nú ájavnir við Liverpool í stigum, og bæði Aston Villa og Arsenal mistu stig í sínum dystum.**

PREMIER LEAGUE

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Ensku veddingarfyritøkurnar síggja sær møguleikan at bjóða fólki at vedda um alt, sum veddast kann um. Nú eru tær fyrstu veddingarfyritøkurnar farnar í holt við at bjóða fólki at vedda uppá, nær Liverpool-venjarin, Rafael Benitez fær sekkin.

Benitez ger tað altíð gott í Champions League, men í ensku kappingini, sum alfaðarin hjá Liverpool nevndi »Our bread and butter«, gongur av skriðuni, eftir eina annars frálíka byrjan í kappingarárinum.

Liverpool hevði ein sera miseydnaðan dag í útidystinum ímóti Middlesbrough. Tá farið var út um hálva tíman setti Xabi Alonso heimaliðið í gongd við einum sjálvmáli. 18 minuttir út í seinna hálvleik setti Tuncay Sanli trumf á, tá hann staðfesti sigurin hjá Middlesbrough. Liverpool søplaði soleiðis møguleikan burtur at leggja trýst á Manchester United.

### Í evstu løtu

Og ilt bleiv verri hjá Liverpool leygardagin, tá teir eisini misti annað plássið, sum gevur beinleiðis atgongd til Champions League. Eitt óvæntað úrslit hekk annars í luftini á Stamford Bridge í London, har Wigan var á vitjan.

John Terry syrgdi fyri at fáa Chelsea á sigurskós, tá hann legði London-liðið á odda eftir 25 minuttirs spæl. Men Chelsea fekk ikki næsta málið, og átta minuttir undan leikloki bleiv kvirt ímillum heimaáskoðarnar, tá Olivier Kapo javnaði fyri Wigan.

Wigan hevði ein javnleik í pottinum út í yvirtíðina, men í evstu løtu gjørdist Frank Lampard enn einaferð bjargingarmaðurin hjá Chelsea, tá hann skoraði til 2-1, og Chelsea hevur nú líka nógv stig, sum Liverpool.

### Villa og Arsenal mistu

Tað gongur illa hjá Arsenal at skora í Premier League fyri tíðina. Og fáa The Gunners ikki skjótt gongd á málskjótingina, so er alstórur vandi fyri, at teir ikki verða millum fýra tey ovastu liðini í Premier League. Arsenal tók ímóti Fulham á Emirates-leikvøllinum, og Fulham fingu tað, teir vóru úti eftir, tá teir hildu Arsenal í einum málleysum javnleik.

Aston Villa fekk møguleikan at hála seg tætt inn at Liverpool, tá teir tóku ímóti Stoke í gjár, men Villa tók ikki av møguleikanum. Sigurin var annars í pottinum hjá Birmingham-liðnum, eftir tvey mál frá Stilian Petrov, og norska John Carew. Men seinastu fýra minuttirnar misti Villa tvey týdningarmikil stig úr hondum, tá fyrst Ryan Shawcross minkaði um munin til 2-1, og Glenn Whelan javnaði til 2-2, og Stoke-spælarnir kundu fegnast um eitt týdningarmikið stig.

### Everton gagnnýtti

Nú tá Manchester United hevur vunnið League Cup-kappingina, so fellur EURO League-plássið í League Cup-kappingini til Premier League. Hetta letur upp fyri møguleikanum hjá t.d. Everton at sleppa við til tað komandi Euro-league kappingina, sum verður avloysarin hjá UEFA Cup. Og við málum frá Tim Cahill og Louis Saha syrgdi Everton fyri at gera sín part av arbeiðnum um vikuskiftið.

Nýggja felagið hjá Gunnar Nielsen, Manchester City, snávaði í dystinum á útivølli ímóti West Ham. Jack Collison hjá West Ham skoraði einasta málið í dystinum.

Stephen Warnock og Keith Andrews skoraðu tvey mál fyri Blackburn innan tveir minuttir í fyrra hálvleiki í útidystinum ímóti Hull. Bert eitt mál fall í seinna hálvleiki, og tað skoraði Ian Ashbee hjá Hull, og kundi Blackburn taka trý týdningarmikil stig við sær til Lancaster.

Annars fekk norski landsliðsspælarin hjá Blackburn, Morten Gamst Pedersen tvey gul kort, og var hann sostatt rikin av vølli. Stutt áðrenn fekk Dean Marney hjá Hull beinleiðis reytt.

Bolton fekk eisini trý týdningarmikil stig á heimavølli, tá teir vunnu 1-0 á Newcastle. Ricardo Gardner skeyt sigursmálið tíðliga í seinna hálvleiki.

**Premier League**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Man Utd | 26 | 19 | - | 5 | - | 2 | 46 | 11 | 35 | 62 |
| 2 Chelsea | 27 | 16 | - | 7 | - | 4 | 47 | 16 | 31 | 55 |
| 3 Liverpool | 27 | 15 | - | 10 | - | 2 | 43 | 20 | 23 | 55 |
| 4 Aston Villa | 27 | 15 | - | 7 | - | 5 | 42 | 27 | 15 | 52 |
| 5 Arsenal | 27 | 12 | - | 10 | - | 5 | 38 | 25 | 13 | 46 |
| 6 Everton | 27 | 12 | - | 8 | - | 7 | 36 | 28 | 8 | 44 |
| 7 West Ham | 27 | 10 | - | 6 | - | 11 | 33 | 34 | -1 | 36 |
| 8 Wigan | 27 | 9 | - | 8 | - | 10 | 27 | 26 | 1 | 35 |
| 9 Fulham | 26 | 8 | - | 10 | - | 8 | 24 | 22 | 2 | 34 |
| 10 Bolton | 27 | 10 | - | 3 | - | 14 | 30 | 38 | -8 | 33 |
| 11 Man City | 27 | 9 | - | 5 | - | 13 | 43 | 36 | 7 | 32 |
| 12 Sunderland | 26 | 8 | - | 7 | - | 11 | 27 | 33 | -6 | 31 |
| 13 Hull | 27 | 7 | - | 8 | - | 12 | 33 | 50 | -17 | 29 |
| 14 Tottenham | 26 | 7 | - | 7 | - | 12 | 28 | 32 | -4 | 28 |
| 15 Newcastle | 27 | 6 | - | 10 | - | 11 | 33 | 43 | -10 | 28 |
| 16 Portsmouth | 26 | 7 | - | 7 | - | 12 | 29 | 43 | -14 | 28 |
| 17 Blackburn | 26 | 6 | - | 8 | - | 12 | 30 | 43 | -13 | 26 |
| 18 Middlesbr. | 27 | 6 | - | 8 | - | 13 | 20 | 36 | -16 | 26 |
| 19 Stoke | 27 | 6 | - | 8 | - | 13 | 25 | 44 | -19 | 26 |
| 20 WBA | 27 | 6 | - | 4 | - | 17 | 24 | 51 | -27 | 22 |